# Posta Stamps
Føroyar

Nr. 26
November 2015

ISSN 1603-0036




**Nýggjar frímerkjaútgávur:**
- Westerbeek, Brandbilar, Sepac 2016: Árstíðir
- Kapping: vel ársins vakrasta frímerki
- Ársins endasøla

Posta
FAROE ISLANDS










FO 822-823

Royndarprent

# Eysturindiafarin "Westerbeek"

Beint fyri midnátt, tann 2. september 1742, kemur eitt stórt seglskip við øllum seglum vundin í rá siglandi úr myrkrinum og stevnir beint á land vestanfyri Lopra. Í myrkrinum og í mjørkanum varnast manningin ikki at teir stevna beint á land. Skipið er meiri enn 48 fjórðingar ov norðarlaga. Nú er ov seint, tí stóri eysturindiafarin, ið er komin allan vegin úr Ceylon, er bert eini hálvthundrað favnar úr berginum í Lopra. Snarað varð hart og seglini vórðu eisini snaraði á, men skipið tók í bakborðssíðu og fór at bresta móti berginum. Úrslitið var at skipið fór at leka illa, men varð skjótt tikið inn millum fýra sker. Skiparin gav boð um at kasta akker og taka seglini niður, men ov seint var. Afturendin á skipinum bardist móti berginum. Manningin kom sær tó uppá eina rók, har nógv teir flestu vóru bjargaðir, men teir sum lógu sjúkir í koyggjuni fórust og onkur datt niðurímillum eisini. Tá fýra av monnunum komu til Vágs at biðja um hjálp, sigst at vágbingar hildu teir vera sjórænarar og krógvaðu seg fyri teimum.

Tað stóð illa til hjá manningini, men hóast skipið so líðandi sakk og hvarv, so bjargaðust heili 81 mans, meðan 10 doyðu av hendingini. Í Suðuroy vóru teir væl móttiknir. Teir fóru skjótt til Havnar, har sjófrágreiðing varð løgd fram. Ikki var lætt at breyðføða og herberga øllum hesum monnum, tí tá var fólkatalið í Føroyum ikki meiri enn gott 3.000. Ikki allir sluppu av landinum við skipunum hjá Kongaliga handlinum, og teir flestu máttu tí bíða til árið eftir, tá hálendska skipið Mercuruis kom eftir teimum.

Søgan um skip sum Westerbeek er samstundis søgan um risastóra hálendska eysturindiska felagið *Vereenigde Oost-indische Compagnie*, ið var stovnað í 1602. Hetta er søgan um hvussu fleiri lond í Evropa



Ein skipasmiðja hjá Eysturindiska
Felagnum í Amsterdam í 1726. Koparstikk eftir Joseph Mulder.
Eysturindiska Felagið bygdi yvir 2000 skip, har av gingu eini 600 burtur.

runnu um kapp fyri at grundleggja hjálond í ymiskum heimspørtum, ið kundu útvinna og keypa dýran farm við heim, so sum krydddurtir, te og kaffi. Eitt ríkidømi, ið enn eyðkennir flestu stórbýir í Evropa, so sum London, Amsterdam, Keypmannahavn og aðrar. Felagið gjørdist so máttmikið, at tað gjørdist ein statur í statinum og felagið fekk ikki einans einkarrætt at handla við Eysturindia, men eisini rætt til at útbúgva egnar hermenn og soleiðis hava egnan her við á ferðini. Hálendska eysturindiska felagið bygdi borgir og skansar í nærum øllum heimspørtum. Millum 1602-1795 gjørdi felagið 4.721 ferðir úr Hálandi til Eysturindia. Samlaða manningartalið var 973.000 sjófólk úr øllum Evropa, tó vóru teir flestu hálendingar.

Westerbeek er bæði ein bygd uttanfyri Eindhoven í Hálandi og navnið á hesum trímastraða skipi, ið fór á land í 1742 vestanfyri Lopra. Skipið varð bygt í 1722 á skipasmiðju í Amsterdam og var ein 145 fót langur og 650 tons tungur eysturindiafari.

Skipið var ávegis til Hálands úr Ceylon í India, tá tað sigldi á land í Føroyum. Ferðin kom at vera drúgv, farið var úr Ceylon í India 27. januar 1742 og 2. september í 1742 sigldi Westerbeek á land. Hetta var sætta ferðin hjá skipinum, men av nógvum mjørka kundi ikki siglast eftir vanligum tólum og tí fórst skipið. Tá vóru ongir vitar í Føroyum og sjókortini vóru ikki so neyv.

Við umborð á Westerbeek á ferðini til India vóru upprunaliga 160 mans: 99 sjómenn, 51 hermenn og 10 handverkarar. Tá í tíðini var vandamikið at mynstra umborð á hesar longu ferðir, tí vanligt var at góð 15 % av manningini doyðu á útferðini og eini 10% á heimferðini.



Punto Gale á Ceylon.
Útsýni yvir strondina eftir Bellini 1748.

Heimferðin hjá Westerbeek byrjaði í Punto Gale á Ceylon og við á ferðini vóru 94 mans: 75 sjómenn, seks hermenn, sjey handverkarar, fimm sjúklingar og ein brotsmaður. Westerbeek hevði gott hundrað tons av pipari og øðrum vørum. Á ferðini úr Batavia, ið var hjálandanavnið á hálendska Eysturindia, sum vit í dag kalla Jakarta, vóru tríggir mans longu deyðir. Batavia er eisini elsta navnið fyri Niðurlond, t.d. fanst Bataviska Republikkin frá 1795-1806 sum ein franskur vasalstatur.

Enn eru spor eftir Westerbeek í Føroyum, m.a. er eitt skrín á Forngripasavninum og ein klumpur av pipari er á einum savni í Suðuroy. Eisini sigast nógvir føroyingar at vera ættaðir frá hesum monnum, tí í minsta lagi nakrir av teimum vóru verandi og fingu børn í Føroyum, harímillum sveisiski feltskerin (kirurgur) Joseph Gervording von der Schildt (uml. 1707-1753).

Eysturindiafarin Westerbeek er skip, ið umboðar eina tíð, tá Háland var eitt av stóru hjálandaveldunum í heiminum og Amsterdam var ein hin mætasti staður í heiminum. Býurin og kanalirnar, ið eru bygdar til skip sum Westerbeek, og tey óendaligu umbygdu pakkhúsini við kranum ovast, boða enn um eina mæta handilstjóð. Stendur man í Amsterdam og lítur við teim røttu eygunum eftir innara býnum, so er hann ikki júst bygdur til bilar. Her eru vegirnir kanalir, ið kunnu senda stór framkomin farmaskip langt inn í býin og inn í landið. Tá kanska man okkurt kvøldið á einum gongutúri - í hugaheiminum - hómar skip sum Westerbeek leggja at bryggju.

Kim Simonsen
Amsterdam Universitet













FO 824-826 Royndarprent

# Brandbilar

## Eldur góður vinur, men ringur óvinur

Posta gevur út trý frímerki við myndum av søguligari brandpumpu og tveimum søguligum brandbilum. Pumpan, sum er frá 1776 og umvæld í Danmark í 1819, er fyrsta brandpumpa í Føroyum. Menningin av sløkkiliðsamboðum í Havn og menning av Tórshavn sum býur hava gingið hond í hond seinastu tvey hundrað árini. Jú meira býurin vaks, jú meira gjørdist tørvur á nýggjum sløkkiliðsamboðum.

Fara vit aftur til 1880, búðu 984 fólk í Havn. Flestu fólkini búðu úti á Reyni, og húsini stóðu sera tætt - tí vóru fólk ógvuliga varin, hvussu tey umfórust eld. Hesi árini vaks Havnin skjótt, tí nógv fólk av bygd fluttu til Havnar. Vatnleiðingar vóru tá ikki lagdar í húsini, og eingir brandpostar vóru tí til at taka. Kom eldur í, varð brandpumpan drigin millum húsini, alt eftir hvar eldurin var.

Vatn til brandpumpuna fekst úr sjónum ella úr áum, og tá brandpumpan onga føðipumpu hevði, varð keta við fólki við spann í hond gjørd frá brandpumpuni antin oman til sjóvarmálan ella út í áirnar. Í 1822 var bygt sproytuhús úti á Reyni til brandpumpuna, og sløkkiliðsamboð vóru eisini fingin frá kongliga einahandlinum. Øll hesi amboð vóru í 1898 flutt niðan í nýggja sproytihúsið norðan fyri kommunuskúlan á Vaglinum.

Vit skulu heilt fram til 1933, tá Tórshavnar sløkkilið varð stovnað. Tá búðu um 3000 fólk í Havn, og býurin vaks spakuliga niðan Tinghúsvegin, Tróndargøtu, Niels Finsens gøtu, út í Vágsbotn og undir Pisuvarða. Nú gjørdist frástøðan ov stór frá brandpumpuni til sjóvarmálan, og serliga tá áirnar vóru turrar um summarið. Tí vóru brandhyljar gjørdir í Rættará og Havnará. Fyrsti brandhylurin varð gjørdur á Vaglinum, seinni vóru



tveir bygdir í Havnará oman fyri Sjónleikarhúsið. Brandhyljarnir vóru gjørdir til tess at savna vatn um summarið, um eldur kom í. Í Havnará oman fyri Sjónleikarhúsið síggjast enn tveir hyljar.

Í 1948 var stórhending í Havn, tí tá fekk Tórshavnar sløkkilið fyrsta brandbilin. Hetta var ein Bedford lastbilur  keyptur úr Onglandi. Teir riggaðu bilin til brandbil, og við brandbilinum fylgdu tvær motorpumpur. Bilurin varð útgjørdur við 500 metrar langari slangu og 20 metrar longum skjótistiga. Tíggju brandmenn kundu sita aftan í bilinum, og pláss var eisini fyri brandbúnum og øðrum amboðum. Nú leita tankarnar til ungdómsárini, tí hesin brandbilur og eg eru javngamlir. Vit ungu vóru klár beinanvegin, tá brandlúðrarnir fóru at ýla ymsastaðni í býnum. Minnist, at eitt lúðurhorn stóð á takinum á Telefonhúsinum í miðbýnum, eitt á Turkihúsinum úti í Hvannasundi og eitt á Skansanum. Lúðrarnir hoyrdust um allan býin. Vit ungu við Landavegin fóru í skundi niðan á Stórheygg, har gott útsýnið var yvir býin. Vit hugdu fyrst eftir royki, síðani lurtaðu vit eftir ljóðinum frá brandbilinum, sum vit kendu, áðrenn vit hildu til beins.

Nógv fólk sóu altíð eldsbrunarnar, bæði stórar og smáar. Brandbilar, brandlúðrar og eldur ávirkaðu okkum ungu. Hetta at síggja brandmenn í hjálmum og búnum royna at fáa tamarhald á eldinum. Eitthvørt dragandi var í øllum hurlivasanum, tí mangan komu fólk alt ov nær, so brandmenn fingu ikki arbeitt.

Vit skriva nú 1962, og tá kemur nýggjur gamal brandbilur úr Danmark. Hetta var ein brúktur brandbilur, bygdur í Danmark í 1937. Framstigið við "Triangel-brandbilinum" var, at hann hevði vatntanga, sum tók 1500 litrar. Var eldurin ikki kyknaður rættiliga og hevði ikki breitt seg, kundu brandmenninir basa eldinum við trýstsproytu frá bilinum, áðrenn vatnslangur og pumpur vóru riggaðar til.




Hesi trý frímerkini, sum Posta gevur út, boða frá søguni og harvið menningini av sløkkiliðsarbeiðnum í Havn. Eg fegnist um, at tey á Brandstøðini, sum nú heldur til í gamla grótbrotinum við Oyggjarvegin, hava varðveitt báðar sløkkiliðsbilarnar og ikki minst brandpumpuna frá 1776, umvæld í Danmark í 1819. Mín serligi áhugi er Bedford K brandbilurin, tí sum ungur lærdi eg til bilsmið hjá Vilhelmi Nielsen, sum umboðaði Bedford í Føroyum. Eg kendi væl nógvar av brandmonnunum, og ein teirra segði mær einaferð, at Bedford brandbilurin hevði ov lítlan motor til brøttu brekkurnar í Havn.

Nógv vatn er runnið í áirnar í Havn, síðan fyrsta vatnpumpan kom til Føroya í 1776. Tá búðu 10% av fólkunum í Føroyum í Havn. Nú skriva vit 2015, og Tórshavnar kommuna umfatar Suðurstreymoy, Kollafjørð, Nólsoy, Hest og Koltur. Eini 40% av fólkunum í Føroyum búgva í Tórshavnar kommunu.

So hvørt sum Havnin er vaksin, er Tórshavnar sløkkilið ment og útbygt og hevur tey amboð, sum sløkkilið í grannalondunum hava. Sløkkiliðið er skipað við fulltíðarstørvum, men er tørvur á meiri manning, eru sløkkiliðsfólk til at taka í býnum.

Vagnur Michelsen







FO 827 Royndarprent

# Sepac 2016: Árstíðir

*Ein dagin, mín sál var so vetrarstird,*
*eg gekk mær mót havinum vestur;*
*eg hoyrdi títt "klipp", tað vælkenda ljóð,*
*tú kærkomni summargestur.*

Vetraródnir, rusk og slettingur, brimið ið eirindaleyst brýtur við strendur – og so hetta evindaliga vetrarmyrkrið. Hóast lívgevandi Golfstreymurin tryggjar rímuliga mildar vetrar her úti í Norðuratlantshavi, og kuldin sjáldan fer niður um 5 kuldastig, er veturin ein ómild og illfýsin árstíð at taka seg ígjøgnum. Kavarok, regn og heglingsælingur, saman við karráum vindi og nívandi vetrarmyrkrið, kann taka pippið frá teimum flestu.

Tað er tí kanska ikki so løgið, at føroyski próvsturin, tjóðskaparmaðurin og yrkjarin, Jákup Dahl (1878-1944). allarhelst á einum gongutúri í heimbygdini Vágur, varð ryktur úr døprum huga, tá hann brádliga hoyrdi tjaldrið kalla – og fann íblásturin til at skriva ein av okkara mest elskaðu sangum, *"Tjaldur, ver vælkomið"* - ein kvøða til føroyska tjóðfuglin.

Várið í Føroyum verður nevniliga boðað langt áðrenn tað kennist, tá tjøldrini venda heim eftir langa vetursetu á bretsku oyggjunum og fronsku atlantsstrondini. Ímyndarligi týdningurin av heimkomuni av júst hesum fuglinum, er ikki einans treytaður av mentanarligum orsøkum – kallið hjá tjaldrinum, tað eyðkenda "klipp, klipp", rakar eisini loynivitskuna, tann ótilvitandi teldan ið skrásetur tey smáu teknini um at broyting er ávegis. Júst sum við fyrsta lambinum tveir mánaðir seinni, er fyrsta tjaldrið nakað man leggur í geyma og sigur øðrum frá.

So hóast vandin fyri vetraródnum langt frá er av, halda føroyingar Grækarismessu, tann 12. mars, fyri at markera, at tjaldrið er komið og vár er í nánd. Skótar ganga skrúðgongu, talur vera hildnar á stórum fólkafundum



Tjaldur, *Haematopus ostralegus*.
Mynd: Ólavur Frederiksen.

og sangurin hjá Dahl um tann saknaða summargestin verður sungin.

Komandi tíðina fánar vetrarandin burtur úr ábardum landslagi. Longu níggju dagar eftir grækarismessu, er várjavndøgur og ljósið tekur dik á seg, til tað á summarsólstøðu er so umfatandi, at náttin bert er ein kámur skuggi av sær sjálvari. So líðandi broyta oyggjarnar lit – bleikguli vetrarliturin verður avloystur av grønum margfaldi. Oman við teimum óteljandi rennunum í bønum blómar sitróngula sóljan í breiðum beltum – tjóðblóma føroyinga, ið vit elska næstan líka so høgt sum tjaldrið.

So er hásummar – og náttúran gagnnýtir teir mongu ljósu tímarnar til fulnar. Í haganum gongur seyður á beiti, meðan tjaldrið og hagafuglar annars hava úr at gera við at klekja og fóðra ungar. Niðri í bønum varrar sevjuríkt gras í lotinum, meðan æður og teirra harðbalnu ungar dúva í trekum aldum á vánni. Onkur ferðamaður lítur seg bilsin íkring, við ljóði av spælandi børnum klokkan ellivu á kvøldi, men soleiðis er nú einaferð við ljósu summartíðini. Yvirhøvur ferðast ljóð víða eitt hásummarkvøld, tá gangurin frá menniskjans dagliga stríði hevur lagt seg. Geipan av sjófugli, kallandi hagafuglur og smáfuglasangur úr urtagørðum og bønum. Hetta er gleðistíðin, barnatíðin - stevnu- og festivaltíðin.

Eftir ólavsøku kemur so næsta stóra broytingin innangarðs. Bøndur og traðarmenn skulu bjarga vetrarfóður til neyt og seyð og byrja at sláa bøin. Spakuliga vaksa ljósir fýrkantar fram í brekkunum, til bøurin at enda líkist einum yvirvaksnum klútateppi. Landslagið missur tann fríska grøna litin – og uttan av havi koma tey fyrstu heystkendu lágtrýstini



rullandi. Urtagarðarnir broyta lit, tá leyvið á runnum og trøum fyrst gerst gult, síðan reytt og brúnt. Heystið er komið og náttúran fellur so líðandi í dvala.

Í september savnast stórir flokkar av tjøldrum í mølini og við Mariumessu seinnu, fara tey fyrstu á flog og byrja ta drúgvu ferðina til bretsku oyggjarnar og fronsku atlantsstrondina.

Hettar er sorgblíða tíðin - vetrargáttin, tá fólk síggja seinastu tjøldrini hvørva í ein landsynning. Fyri framman bíða vetraródnir, kavi og vátaslettingur.

Men tað er prísurin fyri at búgva á hesum vøkru, men harðbalnu oyggjum. Og vit gjalda hann hóast alt – og vita, at fyrr ella seinni skal tjaldrið aftur kalla og boða frá vári og sól.

Anker Eli Petersen

# Útgávuætlan 2016

**22/02** **Westerbeek** - smáark við 2 frímerkjum og 2 leys frímerki. Westerbeek var eitt hálendskt handilsskip, sum sakk út fyri Lopranseiði í 1742. Lagt til ræ ttis: Anker Eli Petersen. Virði: 17,00 og 19,00 kr. FO 822-823.

**Gamlir brandbilar** - 3 frímerki og sjálvklistrandi hefti (6) og postkort. Myndir av fyrstu brandpumpuni og brandbilunum í Føroyum. Myndir: Martin Sirkovsky. Virði: 1,00, 15,00 og 19,00 DKK. FO 824-826.

**SEPAC 2016: Árstíðir** - 1 frímerki. Vár og heyst, tjøldrini koma og fara. Edward Fuglø leggur til ræ ttis. Virði: 17,00 kr. FO 827.

**01/04** **Postverk Føroya í 40 ár** - smáark við 2 frímerkjum og 1 frímerki. 40 ár eru liðin síðan Postverk Føroya varð sett á stovn tann, 1. apríl 1976. Virði: 9,00 og 17,00 kr. FO 828-829.

**26/04** **Nólsoyar Páll 250 ár** – 1 frímerki.  250 ár eru liðin síðan tjóðarhetjan Nólsoyar Páll varð føddur. Virði: 24,00 kr. FO 830.

**Norðurlandaútgáva: Hjallurin** - 1 frímerki. Evnið hesa ferð er norðurlendskur matur. Foto. Virði: 9,00 kr. FO 831.

**09/05** **EUROPA 2016: Vistfrøði** - 2 frímerki og sjálvklistrandi frímerkjahefti (6). Listafólk: Edward Fuglø og Doxias Sergidou, Kypern. Virði: 9,00  og 17,00 kr. FO 832-833.

**26/09** **Toskaskræða** - 1 frímerki. Fyri fyrstu ferð nakrantíð: Ræ ttilig toskaskræða á frímerkjum. Listafólk og gravørur: Martin Mörck. Heilark við 6 frímerkjum. Virði: 50,00 kr. FO 834.

**Føroysk klæði I** - 2 frímerki og sjálvklistrandi hefti (6) og postkort. Fyrsta útgáva av trimum, sum lýsa tjóðbúnan. Listafólk: Edward Fuglø. Virði: 9,00 og 17,00 kr. FO 835-836.

**Jesus úr Nasaret** - smáark við 10 frímerkjum. Træskurðir eftir Edward Fuglø. Træskurðirnir hanga í kjallaranum í Christianskirkjuni. Virði: 10 x 9,00  kr. FO 837-846.

**01/10** **Postgjaldsmerki 2016** -  fýra postgjaldsmerki. Evnið: Tónleikafestivalar. Virði: 4 x 9,00  kr.

**07/11** **Árbók, ársmappa og jólamerki.**

# Vel ársins vakrasta frímerki 2015

## og verð við í lutakasti um eitt seyðaskinn



FO 800



FO 801



FO 810



FO 811



FO 804-807



FO 808



FO 809



FO 802



FO 803



FO 808-809



FO 817



FO 814-816



FO 812



FO 813



FO 820



FO 821



FO 818



FO 819

## 1. vinningur: seyðaskinn úr Stóru Dímun
## 2. vinningur: árbókin 2015
## Harumframt draga vit lut um 5 ársmappur frá 2014

---

Klipp lepan út og send okkum hann ella atkvøð á www.stamps.fo.
Seinasta freist at atkvøða er 15. mars 2016!

Navn: ______________________________

Bústaður: ______________________________

Postnr./Bygd: ______________________________

______________________________

______________________________

Kundanr.: ______________________________

**Ársins frímerki 2015 er:**

FO ____________

☑ **Ja,** takk. Eg vil fegin tekna meg fyri tíðindabrævið frá Posta Stamps, sum verður sent við telduposti.

**T-postur:** ______________________________

# Ársins endasøla

Hin 31. desember 2015 er seinasti søludagur fyri frímerkini og vørurnar á hesum síðum.

Hetta er tískil seinasti møguleiki, at ogna sær frímerkini fyri áljóðandi virði.

Vørurnar kunnu bíleggjast á bíleggingarlepanum mitt í blaðnum ella á heimasíðu okkara: www.stamps.fo.



FO 724



FO 724



FO 729-730



FO 725-728



FO 745-746



FO 731-732



FO 735-737



FO 733-734



FO 747



FO 739-744



FO 677-680



FR 036



FO 710-711



FO 748-749



FO 714-715



Jólasangir 3, hefti við 8 frímerkjum
PPN000912



Sjónotur, sjálvklistrandi hefti við 8 frímerkjum
PPN000212

## Árbók 2011



Føroysk/donsk: PPZDKVI11
Ensk/týsk: PPZENVI11

## Ársmappa 2011



PPY002011

## FDC-mappa 2011


FDM002011

# Nýggjar frímerkjaútgávur - 22. februar 2016




Royndarprent




| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Westerbeek** |
| Útgávudagur: | 22.02.2016 |
| Virði: | 17,00 og 19,00 kr. |
| Nummur: | FO 822-823 |
| Frímerkjastødd: | 45,00 x 30,45 mm |
| Stødd, ark: | 100 x 70 mm |
| Snið: | Anker Eli Petersen |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Joh. Enschedé, Niðurlond |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa og til onnur lond, 0-50 g. |










Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Gamlir brandbilar*** |
| Útgávudagur: | 22.02.2016 |
| Virði: | 1,00, 15,00 og 19,00 kr. |
| Nummur: | FO 824-826 |
| Frímerkjastødd: | 30,0 x 43,5 mm |
| Myndir: | Martin Sirkovsky |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | LM Group, Kanada |
| Postgjaldsbólkur: | Ískoytisvirði, innanoyggja miðalbrøv, 51-100 g, og smábrøv til onnur lond, 0-50 g. |

* hesi frímerki eru eisini givin út í hefti við 6 sjálvklistrandi frímerkjum - tvey av hvørjum virði






Royndarprent

| | |
|---|---|
| Nýggj útgáva: | **Sepac 2016: Árstíðir** |
| Útgávudagur: | 22.02.2016 |
| Virði: | 17,00 kr. |
| Nummur: | FO 827 |
| Frímerkjastødd: | 43,0 x 24,4 mm |
| Lagt til rættis: | Edward Fuglø |
| Prentháttur: | Offsett |
| Prentsmiðja: | Cartor Security Printing, Frakland |
| Postgjaldsbólkur: | Smábrøv til Evropa, 0-50 g |

Framsíðumynd: Bedford K 1948. Mynd: Martin Sirkovsky
Snið og uppsetan: Posta Stamps. Prentsmiðja: Føroyaprent

Posta Stamps
Óðinshædd 2
FO-100 Tórshavn

Tel. +298 346200
Fax +298 346201
stamps@posta.fo
www.stamps.fo

/faroestamps